# Heilsumálaráðið

Dagfesting: 03-03-2023
Mál nr.: 22/22298-5
Málsviðgjørt: GMM
Ummælistíð:
Eftirkannað:

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## freist hjá viðgerðarstovnum at fáa brot á góðkenningarkrøv og átaluverd viðurskifti í rættlag

Við heimild í § 3, stk. 5 í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai verður ásett:

**§ 1.** Um ein viðgerðarstovnur ikki longur lýkur góðkenningarkrøvini nevnd í §§ 4-11 í kunngerð nr. 75 frá 29. mai 2020 um góðkenning av stovnum, ið veita rúsviðgerð, ella um átaluverd viðurskifti eru viðvíkjandi virkseminum, kann Heilsutrygd taka góðkenningina hjá viðgerðarstovninum aftur.

**§ 2.** Ein viðgerðarstovnur hevur eina freist á í mesta lagi 8 mánaðir at fáa viðurskiftini í rættlag, so hann lýkur góðkenningarkrøvini.

*Stk. 2.* Um álvarsligt brot er framt á góðkenningarkrøvini, kann Heilsutrygd tó taka góðkenningina aftur uttan ávaring.

**§ 3**. Í teimum førum, har átaluverd viðurskifti eru viðvíkjandi virkseminum á einum viðgerðarstovni, ger Heilsutrygd í hvørjum einstøkum føri eina meting av, hvussu langa freist viðgerðarstovnurin fær til at fáa viðurskiftini aftur í rættlag. Freistin kann tó ongantíð vera longri enn freistin nevnd í § 2, stk. 1.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 03-03-2023

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Turid Arge